# Flogferðslan minka eitt vet

**Talið av ferðafólki fyrra hálvár í ár minkaði eitt vet samanborið við fyrra hálvár í fjør**

FLOGFERÐSLA
*Stefan í Skorini*

Tilsamans 66.600 fólk fóru um flogvøllin í Vágunum frá 1. januar til 1. juli í ár. Hetta talið er eitt vet lægri, um hugt verður eftir hagtølunum frá í fjør. Tá ferðaðust 67.272 fólk um flogvøllin í Vágunum.

Juni, juli og august eru altíð teir mánaðirnir, tá flest fólk ferðast um flogvøllin í Vágunum, og tí verður spennandi at síggja, um samlaða flogferðslan um flogvøllin fer at minka ella at vaksa.

Hagtølini higartil í ár kundu bent á, at samlaða ferðslan fer at minka í ár, og hetta er ongantíð hent síðan 1993, tá ferðslan minkaði við 7,7 prosentum. Tað árið ferðaðust bara 87.113 fólk um flogvøllin. Í fjør var talið nærum tvær ferðir so stórt, tí tá fóru 158.056 fólk um flogvøllin. Sostatt er talið av ferðafólki, sum hava valt at ferðast við flogfari, økt seinastu átta árini.

Hagtølini hjá flogvøllinum fara heilt aftur til 1963, og tá fóru bara 943 fólk av landinum við flogfari.



*Talið av ferðafólki, sum ferðaðust um flogvøllin fyrstu seks mánaðirnar í ár, var eitt vet lægri enn sama tíðarskeið í fjør*

# Flogfar fekk skaða í ódnarveðri

**Sera nógvur vindur var á Keypmannahavnarleiðini mikukvøldið, og annað flogfarið hjá Atlantic Airways fekk ein lítlan skaða í ódnarveðrinum**

FLOGFERÐSLA
*Stefan í Skorini*



*Flogfarið hjá Atlantic Airways fekk ein lítlan skaða í ódnarveðrinum í Keypmannahavn mikukvøldið, og hylkið um tann eina motorin mátti skiftast út*

Meðan flogfarið stóð á flogvøllinum í Kastrup, varð tað tikið av eini sera sterkari hvirlu, sum hevði við sær, at flogfarið flutti seg eitt vet og rakti eitt portur á flogvøllinum.

Eitt hylki um tann eina motorin fekk skaða og mátti skiftast út. Atlantic Airways mátti tí leiga eitt annað flogfar fyri at avgreiða flogferðsluna sum vant.

Tað leigaða flogfarið fleyg úr Billund til Føroyar og aftur til Keypmannahavnar. Tá vóru mekanikararnir lidnir við umvælingina og flogfarið er nú aftur í vanligari rutuflúgving.

Magni Arge, stjóri í Atlantic Airways, sigur, at hetta elvdi til eina lítla seinking, men øll ferðafólkini komu uppá pláss. Nøkur vórðu send við Maersk-flogfarinum, meðan onnur fóru við leiguflogfarinum.

Spurdur um óhappið gjørdist dýrt hjá felagnum, sigur hann, at alt innan flúgving er kostnaðarmikið.


## Summarfrí

Vegna summarfrí er skrivstova okkara stongd frá mánadegnum 15.07.02 til og við fríggjadagin 02.08.02.

ADVOKATVIRKIÐ

Páll Nielsen, Eyðhild Skaalum
Sigmund Poulsen, Hans Trygvi Teirin
Skansavegur 1 • Postsmoga 85
110 Tórshavn
Tlf. 312227 • Fax 312241
Teldupostur: advokat@post.olivant.fo


Lívstrygging:

# Úrslit á 4,3 milliónir

ROKNSKAPUR
*Stefan í Skorini*

Úrslitið hjá Føroya Lívstrygging innan tryggingarvirksemi gjørdist 3,5 milliónir krónur í fjør. Hetta er væl hægri enn árið fyri, tí í 2000 var úrslitið bert 2,3 milliónir krónur.

Rakstrarúrslitið hjá Lívstrygging í 2001 gjørdist tó verri enn í 2000. Rakstrarúrslitið í fjør gjørdist slakar 4,3 milliónir krónur samanborið við 4,5 milliónir árið fyri.

Úrslitið áðrenn skattur var goldin gjørdist 4,73 milliónir krónur í fjør. Lívstrygging galt síðani 460.000 krónur í skatti og avgjøldum, sum hevur við sær, at rakstrarúrslitið gjørdist 4.272.815 krónur.



*Tummas Eliasen er stjóri í Føroya Lívstrygging, ið hevði eitt rakstrarúrslit á slakar 4,3 milliónir krónur*



# Shell er nú Select

**Shellstøðin á Norðara Ringvegi í Havn er vorðin til eina stásiliga Selectstøð**

*Ingrid Bjarnastein*

Nøkur kenna helst longu Selectstøðirnar. Tær eru útbreiddar í Danmark, og ein er í Gøtu. Nú er ein av hesum vælumtóktu Selectstøðunum eisini í høvuðsstaðnum, og er tað Shellstøðin á Norðara Ringvegi í Havn, sum er broytt, og gjørd til eina slíka.

– Hendan er minst líka fín sum tann í Gøtu, sigur Hans Gotfred Thomsen, leiðari á Selectstøðini í Havn.

– Munurin á eini Shellstøð og eini Selecstøð er tann, at støðið er eitt sindur hægri. Harafturat er inventarið fínar, bakgrundstónleikur spælir allatíðina, og loftið er eisini senkað.

Umbygt er inni á sjálvari støðini, soleiðis, at nú virkar sjálvt rúmið nógv rúmligari. Kassadiskurin er vorðin breiðari, og ljósari er eisini.

Tað er vorðið lættari at sleppa inn á sjálva støðina, tí ein rampa er gjørd, soleiðis at fólk, sum sita í rullustóli eisini sleppa inn, og harumframt er eitt handicap-wc gjørt.

Selectstøðin selur eisini nýggjar bakaravørur, sum tey sjálvi baka. Soleiðis kunnu tey veita kundunum frískt bakað breyð, rundstykki, wienarbreyð og annað allan dagin.

– Selectstøðirnar royna at veita størri vøruúrval, og hava vit eitt breitt úrval av køli- og frystivørum nú.

Harumframt eru eisini tær vælumtóktu Selectpylsurnar, sum bara Shell sleppur at selja. Tær hava nógv kjøt, lítið feitt, og ongar soya-proteinir.

Eisini eru upplatingartíðirnar broyttar eitt sindur.




*Hans Gotfred Thomsen, leiðari á støðini, avmynadaður uttanfyri stásiligu og nýumbygdu støðina*
*Mynd: Jens Kr. Vang*



*Umfatandi umbyggingar eru farnar fram á Shellstøðini á Norðara Ringvegi í Havn*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

Nú er opið hvønn dag frá klokkan 7.00 á morgni til klokkan 23.00 á kvøldið. Áðrenn var lat støðin upp klokkan 7.30 og lat aftur klokkan 23.00 seks dagar um vikuna, meðan sunnudag var opið frá klokkan 9.00 til 23.00.

Dánjal Andreasen, formaður í FSF:

# Lat mannin sleppa í gongd

**Dánjal Andreasen, formaður í FSF heldur, at viðferðin nýggi landsliðsvenjarin, Henrik Larsen fær, er órættvís, og at vit áttu at tikið betri ímóti manninum**

LANDSLIÐIÐ
*Ingrid Bjarnastein*

– Latið mannin fyrst sleppa í gongd, sigur Dánjal Andreasen, formaður í FSF.

– At fílast inn á Fótbóltssambandið er í lagi, men betri skuldi verið tikið ímóti manninum, tí hann hevur onki gjørt enn.

Dánjal Andreasen sigur, at tað sjálvandi hevði verið ynskiligt, at havt ein venjara, sum er í Føroyum alt árið, men teir fíggjarligu karmarnir loyva hesum ikki, so venjarin er valdur út frá einum fíggjarligum støði.

Henrik Larsen varð annars settur í starv frá 1. juli, og ikki frá hálvum apríl.

Men er tað so rætt, at hava ein hjálparvenjara, sum hevur eitt annað lið at taka sær av?

– Hjálparvenjarin hevur verið venjari í seks ár nú. Eisini hevur hann verið ungdómsvenjari í nógv ár, og er hann ein tann maðurin, ið kennir teir føroysku spælararnar best, sigur Dánjal Andreasen.

So boðskarpurin hjá formanninum í Fótbóltssambandinum er greiður. Henrik Larsen eigur at fáa ein møguleika áðrenn høgt verður eftir honum.



*Dánjal Andreasen, formaður í Fótbóltsambandinum, sigur, at Henrik Larsen eigur at fáa ein møguleika áðrenn høgt verður eftir honum*
*Savnsmynd*

Nýggja Norrøna:

# Avtalan komin undir land

Í tíðindaskrivi boðar Smyril Line frá, at endalig avtala er nú gjørd millum felagið og týsku skipasmiðjuna Flender Werft, sum er í gjaldsteðgi.

Flender Werft hevði herfyri fíggjarligar trupulleikar í sambandi við bygging av tveimum sjóttgangandi ferðamannaskipum til ein grikskan reiðara, og noyddist tí at fara í gjaldsteðg tann 3. juni 2002.

Skipasmiðjan hevur nú tryggjað sær neyðugu fíggingina til at kunna byggja M/F Norrønu lidna, og umframt at hevur hon styrkt um byggileiðsluna á skipasmiðjuni, og tí heldur arbeiðið ótarnað fram.

– Vit kenna okkum trygg við støðuna, og skipið verður latið okkum, sum ætlað í mars 2003, sigur Óli Hammer, stjóri á Smyril Line at enda í tíðindaskrivi.

-ib


